## Palestinar fóru í felluna

Høvdu palestinar dugað líka væl at brúka fjølmiðlarnar sum ísraelsmenn, høvdu teir tikið tær jødisku synagogurnar í Gaza-geiranum niður og latið ísraelsmonnum tær við einari viðmerking um, at tey jødisku niðursetufólkini høvdu gloymt okkurt eftir, tá tey fóru haðani.

Ístaðin fyri gjørdu palestinar júst tað, sum ísraelsku myndugleikarnir høvdu vónað, og tí vístu tær fyrstu sjónvarpsmyndirnar úr tí palestinska Gaza-geiranum, hvussu palestinar settu eld á synagogurnar. Nú kundi so allur heimurin síggja, at hetta var ikki eitt hersett og kúgað fólk, sum fekk land sítt aftur, men heldur eitt harkalið av búrkroppum, og at ágangurin ímóti jødiska fólkinum heldur fram, skrivar Bergens Tidende.

Ísraelski uttanríkisráðharrin, Silvan Shalom, segði fyrrakvøldið, at palestinska framferðin var ósiðilig, og at hetta vóru fólk, sum als ikki høvdu nakra virðing fyri halgum støðum. Palestinski ráðharrin Muhammad Dahlan svaraði, at palestinararnir, sum settu eld á synagogurnar, vóru farnir í eina fellu, sum ísraelsku myndugleikarnir høvdu lagt.

– Ætlanin við hesum var at vísa, at palestinar eru eitt ómentað fólk, samstundis sum tað skuldi rættvísgera ísraelska ágangin ímóti halgum palestinskum støðum, segði Muhammad Dahlan.

## Ákærdir fyri morð

Fimm bretar, sum eru ákærdir fyri at hava myrt 21 kinesiskar arbeiðsmenn, koma fyri rættin í næstu viku. Teir 21 kinesararnir arbeiddu við at henta skeljar í Morecambe-víkini, men teir varnaðust ikki flóðina og druknaðu.

Málið vakti stóran ans. Tað kom fram, at kinesararnir høvdu fingið eitt bretskt pund ella einar 11 krónur um dagin, og at arbeiðsdagurin var níggju tímar. Eisini kom fram, at kinesararnir høvdu ikki arbeiðsloyvi í Bretlandi, og bretsku myndugleikarnir hava tí sammett málið við nútímans trælahald.

Ákæruvaldið hevur ákært Liang Ren Lin, sum er bretskur ríkisborgari, fyri morð og fyri at hava verið uppi í mannasmugling. Tveir aðrir kinesarar, sum eisini eru bretskir ríkisborgarar, eru saman við bretanum David Anthony Eden ákærdir fyri mannasmugling í sama máli.

Morecambe-víkin er á bretsku vesturstrondini. Hon er tiltikin fyri sín vakurleika, men mong tora ikki at fara hagar, tí tað fløðir og fjarar sera skjótt har.

## Oljuprísurin fær avleiðingar

Aðalstjórin í evropeiska miðbankanum, Jean-Claude Trichet, sigur við tíðindatænastuna Bloomberg, at tað er eingin ivi um, at tann høgi oljuprísurin fer at tálma búskaparligu framgongdini, og at hann fer at elva til hægri inflasjón.

Bloomberg skrivar, at tann høgi oljuprísurin kemur teimum oljuframleiðandi londunum væl við, tí tey fáa munandi størri inntøku, enn tey høvdu roknað við. Men hjá teimum flestu londunum virkar oljuprísurin sum ein bremsa í búskapinum, tí hann gevur bæði tí privata og vinnulívinum størri útreiðslur.

Í gjár hevði Jean-Claude Trichet fund við tjóðbankastjórarnar í G-10 londunum, har teir millum annað umrøddu avleiðingarnar av tí høga oljuprísinum. Herfyri kunngjørdi evropeiski miðbankin, at búskaparvøksturin í evrulondunum verður ikki so stórur sum mett. Og oljuprísurin fekk skyldina.

## Vilja sleppa út í rúmdina

Evropeiska rúmdarumsitingin ESA hevur boðið fólki úr ymsum londum at royna seg sum rúmdarmenn, og millum teirra, sum kappast um plássini, eru fýra danir.

Helge Sander, ráðharri í vísindi, sigur við Politiken, at tað er kortini als ikki vist, at nakar dani sleppur út í rúmdina í fyrsta umfari. Hann dylur tó ikki fyri, at málið hevur sera stóran áhuga í Danmark, tí fleiri onnur evropeisk lond hava longu havt menn í rúmdini.

Ætlanin er, at teir evropeisku rúmdarmenninir skulu út í rúmdina við amerikonskum og russiskum rúmdarførum.

UTTAN ÚR HEIMI

# Nú sleppa tey at royna seg



*Kristin Halvorsen, Jens Stoltenberg og Aslaug Haga skulu skipa ta næstu stjórnina í Noregi.*

**Jens Stoltenberg verður nýggjur norskur forsætisráðharri, men hóast reyð-grønu flokkarnir eru samdir um at skipa stjórn, kann tað taka drúgva tíð at orða samgonguskjalið**

NOREG
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Stórtingsvalið mánadagin var søguligt. Fyri fyrstu ferð í fleiri skeið fær Noreg eina meirilutastjórn, og fyri fyrstu ferð sleppur Sosialistiski Vinstraflokkurin í stjórn. Harafturat er tað fyrstu ferð, at Miðflokkurin skipar stjórn saman við teimum báðum flokkunum á vinstravonginum.

Valkvøldið vóru Jens Stoltenberg, Kristin Halvorsen og Aslaug Haga fegin um sigurin. Jens Stoltenberg kundi av sonnum fegnast, tí Arbeiðaraflokkurin hevði eitt sera gott val og fekk 32,8 prosent av atkvøðunum. Hjá Sosialistiska Vinstraflokkinum hjá Kristin Halvorsen gekk minni væl. Flokkurin hevði stóra afturgongd og fekk 8,7 prosent. Miðflokkurin hevði harafturímóti eina lítla framgongd og fekk 6,5 prosent av atkvøðunum. Tilsamans fingu teir tríggir flokkarnir 87 tinglimir.

Tað var ymiskt, sum valið hilnaðist hjá stjórnarflokkunum. Tann størsti, Høgri, fekk ein dyggan frammaná og fekk 14,1 prosent, sum er tað minsta, sum flokkurin hevur havt. Kristiligi Fólkaflokkurin hjá Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharra, fekk eisini ein frammaná og endaði á 6,8 prosentum. Vinstri hevði harafturímótri framgongd og fekk 5,9 prosent.

Tann stóri sigursharrin á borgarliga vonginum var Framburðsflokkurin, sum hevði eitt sera gott val. Flokkurin fekk 22,1 prosent og er nú nógv tann størsti á tí borgarliga vonginum. Tilsamans fingu teir borgarligu flokkarnir 82 umboð í Stórtingið.

### Ósamd um mangt

Samgongusamráðingarnar ímillum teir tríggjar reyðgrønu flokkarnar eru longu byrjaðar, og gongst sum ætlað, verður nýggja stjórnin skipað miðskeiðis í oktober. Men politiskir eygleiðarar í Noregi siga, at samráðingarnar verða ikki léttar, tí teir tríggir flokkarnir eru ósamdir á fleiri økjum.

Eitt nú er Arbeiðaraflokkurin fyri at fara undir oljuvinnu í Barentshavinum, men tað vilja partar av Sosialistiska Vinstraflokkinum ikki hoyra talan um. Arbeiðaraflokkurin er fyri at byggja fleiri gassorkuverk, men tað vilja SV og Miðflokkurin ikki góðtaka, uttan so at orkuverkini lúka sera strangar umhvørvistreytir.

Eitt annað, sum flokkarnir heldur ikki eru samdir um, er, hvussu nógvar oljupengar politikararnir skulu brúka. Arbeiðaraflokkurin hevur hug at spara, men hinir báðir flokkarnir halda, at politikararnir eiga at játta meiri oljupengar til skúlar, samferðslu og heilsumál.

Uttanríkispolitikkin eru flokkarnir heldur ikki samdir um. Arbeiðaraflokkurin er fyri noprskum ES-limaskapi, men tað vilja hinir báðir ikki, so tann spurningurin verður neyvan tikin fram í hesum valskeiðinum.

### Úr politikki

Fleiri kendir norskir politikarar fóru burtur úr politikki á hesum valinum. Ein teirra er forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik. Hann boðaði longu undan valinum frá, at kundi hann ikki halda fram sum forsætisráðharri eftir valið, fór hann at taka seg burtur úr politikki. Tað endurtók hann aftan á ósigurin fyrrakvøldið.

Valið mánadagin var eisini søguligt á tann hátt, at Stórtingið fekk tann yngsta limin, sum tað nakrantíð hevur havt. Tað er tann 21 ára gamla Anna-Kristin Ljunggren, sum varð vald fyri Arbeiðaraflokkinum í Nordland.